ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 28. august 2009

# Forsetin virkaði sum limur í Kappingarnevndini



FSF-forsetin var partur av Kappingarnevndini, tá málið um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen varð viðgjørt

**FSF-forsetin, Høgni í Stórustovu, váttar, at hann tók lut í viðgerðini av málinum um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen. Men hann leggur dent á, at hetta var sum virkandi limur í Kappingarnevndini**




Jákup Mørk

Tað hevur vakt ans, at FSF-forsetin tók lut í viðgerðini, tá Kappingarnevndin hjá FSF skuldi taka støðu í málinum um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen.

Sjálvur dugir Høgni í Stórustovu tó ikki at síggja nakað galið í hesum. Fyrst og fremst, tí hansara leiklutur einki hevði við forsetasessin at gera.

- Vit hava skipað nevndirnar so, at vit altíð hava varamenn tøkar. Bæði tí tað kann berast frá hjá nevndarlimum, men eisini tí Føroyar eru somikið lítlar, at tað altíð vilja íkoma støður, har tú av eini ella aðrari orsøk kann metast at vera inhabilur.

- Tá málið um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen skuldi viðgerast, var næsti dysturin hjá B36 móti KÍ, og tí metti Rúni Heinesen, at hann ikki átti at verða partur av viðgerðini.

- Varamaður hjá honum er Niklas á Líðarenda, men hann var uttanlands, og tí heitti formaðurin í Kappingarnevndini á meg um at taka sæti í nevndini. Upprunaliga skuldi fundurin vera hósdagin, og eg hevði eisini fyrireikað meg til fundin, sum tó varð fluttur til fríggjadag. Tá var Niklas komin aftur til landið, men hann kom at kalla beint úr flogfarinum og til fundin, og hevði tí ikki havt somu møguleikar at seta seg inn í málið. Tí valdi eg at verða partur av viðgerðini, og tað hevði tí einki sum helst við mín leiklut í FSF annars at gera, sigur Høgni í Stórustovu.

## Vilja hava FSF at virða egnar reglur

Størsti parturin av føroysku feløgunum skuldi ætlandi senda áheitan til FSF um at fylgja egnum reglum.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa avrit av nøkrum skrivi fyri evstamark okkara, men alt bendir á, at flestu føroysku feløgini eru alt annað enn nøgd um, at spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen varð flutt úr HB til B36.

Sum skilst hótta feløgini ikki við átøkum av nøkrum slag, men talan er um eina kollektiva áheitan til FSF um at virða tær reglur, sum eru galdandi fyri flytingargluggan.

Kappingarnevndin hjá FSF vísti til grein 17, petti 5, tá spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen varð flutt. Hendan reglan heimilar undantak undir serligum umstøðum, og er áður nýtt til at flyta spæliloyvi hjá málverjum, um felag stendur uttan ein slíkan, og hon varð nýtt í fjør, tá spæliloyvið hjá Tór-Ingari Akselsen var eftir í HB, hóast sáttmálin við 07 var undirskrivaður - og góðkendur av FSF. Í førinum við Christiani Restorff Mouritsen fekk Kappingarnevndin juridiskt upprit, sum í stóran mun frámælti eini flytan av spæliloyvinum. Men kortini varð undantaksreglan nýtt.

*-mørk*

# Starvsnevndin fær málið mánadagin

**Eftir at Kappingarnevndin hjá FSF ikki vildi ganga áheitanini um nýggja málsviðgerð á møti, er líkt til, at málið um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen endar á borðinum hjá Starvsnevndini hjá FSF**




Jákup Mørk

KÍ heitti í vikuni á Kappingarnevndina hjá FSF um at lata Aganevndini málið um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen, soleiðis at nýggj málsviðgerð kann fara fram.

Formaðurin í Kappingarnevndini, Sveinur Tróndarson, segði við Kringvarpið í gjár, at áheitanin ikki varð gingin á møti, og mest sannlíkt er næsta stigið hjá KÍ, at heita á Starvsnevndina hjá FSF um at beina málið til Aganevndina.

Starvsnevndin hevur sín fyrsta fund eftir summarfrítíðina mánadagin, og kemur ein áheitan frá KÍ til hendan fundin, so verður hon sjálvandi viðgjørd, sigur Høgni í Stórustovu, FSF-forseti.

Hann dylur tó ikki fyri, at hann væl kundi hugsað sær eitt friðarligari summar enn tað, sum hevur verið.

- Vit hava havt málið um steypafinaluna, um Hjalgrím Elttør og Christian Restorff Mouritsen og eisini um vit skulu spæla landsdyst á Svangaskarði ella ikki. So tað er einki at ivast í, at vit hava nóg mikið at tríva í, nú nevndin aftur savnast. Hetta eru mál, sum vísa, at vit framvegis hava langt eftir á mál, og sjálvandi verður ein áheitan frá KÍ eisini viðgjørd, um hon liggur á borðinum, sigur Høgni í Stórustovu.